


*Umboð fyri Fíggjarligt Støðufesti á tíðindafundi 18. november í fjør. Keypið bankan, ella lata vit hann aftur fyri jól, vóru boðini til føroyskar íleggjarar tá. Men hóttanin varð ongantíð sett í verk, og nú má Fíggjarligt Støðufesti dúva upp á tey, sum allatíðina hava havt áhuga at keypa Eik, serliga TF Holding, ið kanska fær bankan heilt bíliga*

# Tómar hóttanir um Eik Banka

**Á tíðindafundi hjá Fíggjarligum Støðufesti 18. november í fjør hóttu umboð fyri danska felagið við, at um føroyingar ikki keyptu Eik fyri jól, fór felagið at avrigga bankan. Við útvarpið týsdagin segði Jørn Astrup Hansen, stjóri í Eik Banka, at hetta fer ikki at henda kortini. TF Holding sigst nú nærkast einum keypi fyri væl minni, enn Fíggjarligt Støðufesti ímyndaði sær, tí føroyingar ikki lótu seg hótta**

Uni Arge

Málið um at endurreisa Eik Banka gjørdist drúgvari, enn umboðini fyri Fíggjarligt Støðufesti ynsktu sær. Eftir at Jørn Astrup Hansen hevði sett seg í stjórastólin Yviri við Strond í oktober í fjør, hoyrdist ferð eftir ferð, at bankin fór at verða seldur fyri jól. Skundurin tóktist vera øgiligur at sleppa úr Føroyum aftur, og tá fýra umboð fyri danska uppruddingarfelagið sendu boð eftir føroysku fjølmiðlunum 18. november, var tað við ikki sørt av spenningi, at fjølmiðlarnir møttu upp. Men niðurstøðan eftir tíðindafundin var, at fjølmiðlafólkini høvdu verið vitni til eina beinleiðis hóttan. Um føroyingar ikki gingu saman í eitt samtak og bjóðaðu upp á Eik, ætlaði Fíggjarligt Støðufesti at fara í stálhandskarnar og lata Eik aftur.

Jólini eru nú væl og virðiliga farin afturum og eisini nýggjárið, men enn hevur Fíggjarligt Støðufesti ikki gjørt álvara av sínum hóttanum. Tvørturímóti er komið fram í Kringvarpinum, at danski staturin tók egin fíggjarlig atlit, tá gjørt varð av, at alt Eik-samtakið skuldi leggjast undir Fíggjarligt Støðufesti, og føroyski parturin av Eik ikki kundi verða skildur frá samtakinum. Við teirri avgerðini fór fyri bakka møguleikin hjá áhugaðum íleggjarum at bjarga føroyska partinum, og hetta harmaði Odd Bjellvåg, tásitandi nevndarforman, tí hann sá fyri sær, at bjargingin kundi eydnast. Í dag sigur Jørn Astrup Hansen, at tann loysnin hevði kostað eina milliard eyka, og tí var betri, at alt samtakið fór undir Fíggjarligt Støðufesti.

## Letur ikki aftur

Í Eygsjón í Kringvarpinum týsdagin umrøddu Odd Bjellvåg og Jørn Astrup Hansen, um talan var um banahøgg ella bjarging, tá Fíggjarligt Støðufesti yvirtók Eik Banka. Jørn Astrup Hansen segði, at peningurin hjá innskjótarunum varð bjargaður, men helt, at peningurin hjá partaeigarunum undir øllum umstøðum var mistur 30. september í fjør. Hesum mótsegði Odd Bjellvåg ikki, men vísti á, at niðurskrivingarnar hjá Fíggjarligum Støðufesti í Eik kundu diskuterast. Odd Bjellvåg varð so spurdur, hvat hann helt fór at henda, nú Fíggjarligt Støðufesti skuldi fundast við landsstýrið um Eik Banka. Hann helt, at Fíggjarligt Støðufesti vildi hava landsstýrið at seta pengar í Eik.

Um hetta hendir, veit ongin, men sjónvarpið segði seg í gjár skilja, at landið fer ikki at seta pengar í Eik. Í Eygsjón var Odd Bjellvåg fullvísur í, at Fíggjarligt Støðufesti fer undir ongum umstøðum at avrigga Eik í Føroyum, eins og felagið boðaði frá 18. november í fjør. Tá Jørn Astrup Hansen varð spurdur, hvat hann hevði at siga um hesa útsøgnina, svaraði hann, at hann var samdur. Sostatt hevur Fíggjarligt Støðufesti í roynd og veru viðgingið, at talan var um tómar hóttanir á tíðindafundinum 18. november. Fráboðaða evstamarkið í desember var als ikki nakað altumráðandi evstamark, og hóttanirnar um, at menn fóru at broyta karakter og snara lykilin um í Eik, vóru bluff.

## Sissaðu seg

Í sambandi við bankahúsagangir í Føroyum kemur altíð politikkur í málini. Tað vísir søgan. Illgrunin um arroganta maktnýtslu úr donskum ráðharrastovum og stovnum, tá trýst skal leggjast á føroyskar myndugleikar, er ongantíð fjarur. Tað er hann heldur ikki í Eikmálinum, serliga ikki eftir upplýsingarnar um, hví Fíggjareftirlitið og Fíggjarligt Støðufesti noktaðu fyri, at Eik-samtakið kundi skiljast sundur, so føroyski parturin kundi verða seldur fyri seg. Atburðurin á tíðindafundinum 18. november styðjaði eisini væl upp undir arrogantu ímyndina. Men kanska hevur Fíggjarligt Støðufesti nú sissað seg og skilt, at hóttanirnar í november ræddu ongan í Føroyum.

Sjónvarpið segði seg so í gjár skilja, at løtan er nær, at TF Holding keypir Eik, og at landið verður ikki partur av keypinum. Fær Fíggjarligt Støðufesti 600 milliónir krónur fyri bankan, er tað langt frá teirri góðu milliardini, sum felagið ímyndaði sær at fáa. Útlitini til, at TF Holding fær bankan bíliga, munnu vera søtur songur í oyrunum á øllum føroyingum, ið hava fundast við Fíggjarligt Støðufesti um málið, tí hví skal nakar tíma at leggja fleiri pengar á borðið? Jørn Astrup Hansen hevur sagt, at bankin letur ikki aftur, sama hvat hendir, og læt bankin aftur, hevði í somu løtu tikið seg upp politisk kreppa av tí, at Danmark niðurlegði helvtina av føroyska fíggjarkervinum.

Eina tílíka politiska bankakreppu hevur danski staturin ongan áhuga at skapa, nú Sambandsflokkurin stendur at fáa 31 prosent av atkvøðunum á komandi løgtingsvali, og Lars Løkke Rasmussen skal hava frið at brynja seg til fólkatingsvalið og royna at endurvinna forsætisráðharrasessin. Og so fæst annars at síggja, um aðrir íleggjarar enn TF Holding eru uppi í leikinum, nú Eik Banki skal seljast.

## Fakta

**Føroyingar eru ikki hugaðir fyri, at landskassin setir pengar í Eik. Ein kanning hjá Granskingardeplinum fyri samfelagsmenning vísir, at bara 25,5 prosent av veljarunum taka undir við at seta almennar pengar í Eik. 36,8 prosent eru ímóti tí, og 37,7 prosent eru ivasom.**